# Setanevndarin helt fast um Símun

**Setanarnevndin var ongantíð tað minsta í iva um, at Símun V. Arge var rætti maðurin at seta í starv sum landsantikvarur**

STARVSSETAN
*Heri á Rógvi*

Mánamorgunin fekk Annlis Bjarkhamar eitt bræv frá Magistarafelagnum í sambandi við setanina av nýggjum landsantikvari.

Málið hevur fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum og er vorðið eitt meira ella minni alment mál, og tískil valdi Magistarafelagið at lata brævið til fjølmiðlarnar.

Skrivið stendur at lesa í fullum líki á síðu 13.

### Valdu Símun

Hyggja vit eitt sindur at skrivinum frá Magistarafelagnum, so nýtir felagið nøkur skjøl sum grundarlag, sum ikki eru komin fram fyri almenningin áður. Millum annað stendur soleiðis at lesa:

Í sínari útgreining dagfest 14. januar 2003 viðger setanarnevndin tey lýstu krøvini til fakligan førleika, leiðslu og samstarvsevni, evni at starvast sjálvstøðugt og miðvíst, at ganga nýggjar leiðir og royna nýggjar avbjóðingar. Harumframt tekur setanarnevndin, eftir serligum boðum frá landsstýrismanninum, støði í tí persónliga førleikakravinum, sum lagt varð afturat í donsku lýsingini, nevnliga, »evni at leiða arbeiði á slíkan hátt, at Føroya Fornminnissavn framhaldandi hevur ein fakligan og granskingarligan profil í føroyska samfelagnum og uttan fyri Føroyar«, skrivar Magistarafelagið í brævinum.



*Setarnevndin var ongantíð tað minsta í iva um, at Símun V. Arge var rætti maðurin at seta í starv sum landsantikvarur, men landsstýrismaðurin hevði eina aðra áskoðan.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Somuleiðis verður nortið við fyrstu niðurstøðuna hjá einari samdari setanarnevnd:

– Hóast Símun V. Arge ikki kendi hetta krav tá hann søkti starvið, kemur setanarnevndin kortini til ta niðurstøðuna, at hann er »best egnaður til at røkja starvið sum landsantikvarur, sæð út frá tí, sum starvið fevnir um og ætlandi fer at fevna um framyvir«. Ein samd setanarnevnd leggur afturat í niðurstøðu síni: »Eftir at hava røtt um málið av nýggjum og sett seg í samband við fleiri tilvísingar, er støðan vorðin uppaftur greiðari. Símun V. Arge er sum heild betri egnaður, tí hann hevur góðar fakligar fortreytir, hevur fleiri og meira viðkomandi leiðsluroyndir og hevur betri persónligar eginleikar«, stendur at lesa í brævinum frá Magistarafelagnum.

Sum tað eisini hevur verið nevnt fleiri ferðir, so kom setanarnevndin til somu niðurstøðu tvær ferðir. Setanarnevndin viðger starvið útfrá teirri føroysku lýsingini, sum víkir frá teirra donsku í tí partinum, har tosað verður framtíðarleiklutin hjá Fornminnissavninum.

14. januar tekur setanarnevndin málið upp av nýggjum við nýggjum atlitum, ið landsstýrismaðurin krevur, og sum hava staðið í donsku lýsiningini.

Hóast nýggj fyrilit er niðurstøðan hjá setanarnevndini einmælt og púra greið: Símun V. Arge er tann best egnaði til starvið. Seinni verður Símun V. Arge kallaður inn til eina nýggja samrøðu, men hetta er við landsstýrismannin, og Símun V. Arge sigur seg ikki verða kunnaðan um, at talan var um eina nýggja setanarsamrøðu.

Sum heild er setanarnevndin ikki tað minsta í iva um, at Símun V. Arge er tann rætti til starvið, og hann lýkur øll krøv – bæði á donskum og føroyskum.

M.a. sigur setanarnevndin í skrivi 10.. desember:

“Føroya Fornminnissavn hevur ikki ment seg nóg væl seinastu árini, men eftir nevndarinnar meting, stava hesi viðurskifti helst frá tí ótrygd honum (t.e. Símun V. Arge) hevur verið fyri sum fyribilssettur leiðari, og at ein fastari setan kann broyta hesi viðurskifti.”

# Handilsskúlan nærkast universitets støðu

**Føroya Handilsskúli og Robert Gordon University hava undirskrivað sáttmála, sum formaliserar samstarvið millum lærustovnarnar. Avtalan er partur av ætlanini hjá Handilsskúlanum at bjóða útbúgvingar á universitets støði**

ÚTBÚGVING
*Heri á Rógvi*

Fríggjadagin skrivaðu Føroya Handilsskúli og Robert Gordon University(RGU) í Aberdeen undir samstarvssáttmála.

Báðir lærustovnarnir hava samstarvað hetta seinasta árið við einum flokki av fjarlesarum, sum taka eina masterútbúgving sum fjarlesandi á Robert Gordon University við nøkrum work shops á Handilsskúlanum.

Ragnar Magnussen, stjóri fyri Føroya Handilsskúla, sigur, at teir við hesari avtaluna hava formaliserað samstarvið, sum teir ongantíð hava gjørt nakran sáttmála um.

Fyriuttan flokkin av fjarlesarum, so ætlar handilsskúlin eisini at menna sítt støði til at kunna bjóða útbúgvingar á Universitets støði. Sum er bjóðar handilsskúlin ávísar hægri útbúgvingar enn miðnámsskúla støði, men skúlin ætlar sær enn meira.

– Vit miðja ímóti at útbúgva átta lærarar næstu fýra árini við m.a. skeiðum í Aberdeen. Vit miðja so ímóti at kunna undirvísa fjarlesarunum sjálvi í Føroyum og bjóða aðrar útbúgvingar á bachelor støði í møguligum samstarvi við aðar skúlar, sigur Ragnar Magnussen.

Handilsskúlin hevur eisini samstarv við aðrar lærustovnar, eitt nú Handilsháskúlan BI í Stavanger, har ætlanin er at menna BA útbúgvingar saman við.



*Ragnar Magnussen og William S. Steveliy, rektari á Robert Gordon University, skriva undir samstarvsavtaluna, sum formaliserar samstarvið millum skúlarnar. Fyri handilsskúlan merkir avtalan m.a., at lærarar á skúlanum fara á skeið í Aberdeen fyri at kunna undirvísa á undirversitets støði.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Menningin av lærurunum hjá Handilsskúlanum fer at kosta um eina millión krónur, og peningur fæst eftir ætlan til vega frá oljufeløgunum í form av førleikamenningarpeningi.

## Bíða eftir svari

Magistarafelagið bíðar í løtuni eftir svari frá Annlis Bjarkhamar, landsstýrismanni, til skrivið um setanina av nýggjum landsantikvari, sum felagið vil hava annulerað.

Kate Sanderson, forkvinna í Magistarafelagnum, sigur, at tey fara at kanna, hvørjar møguleikar tey hava um so er, at setanin ikki verður annulerað. Nevndin í felagnum hevur ikki viðgjørt málið aftur, og nú verður bíðað til svarið frá landsstýrismanninum kemur til nakað meira verður gjørt við málið. Eftir ætlan skal fundur vera millum Magistarafelagið og Annlis Bjarkhamar.

**-HR**



# Vil hava Bjarna Djurholm á fund við suðuroyingar

**Jóannes Eidesgaard heldur, at Bjarni Djurholm eigur at havt almennan fund í Suðuroy um nýggju ferjuleguna á Trongisvágsfirði og um Hovstunnilin**

KUNNING
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Í summar er ætlanin at fara í holt við tvær stórar útbyggingar í Suðuroynni. Talan er í fyrsta lagi um nýggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði og í øðrum lagi um Hovstunnilin, sum gongur ímillum bygdirnar Øravík og Hov.




*– Ber tað ikki til at flyta samferðsluhavnina í Trongisvágsfirði 50 metrar fyri at eira Lítluhólmunum, er ein spurningur, sum Jóannes Eidesgaard setir*

Í tí sambandi heldur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins, at tað hevði verið hóskandi hjá landsstýrismanninum at havt ein kunnandi fund í Suðuroynni, har hann kundi greitt almenninginum betri frá hesum báðum ætlanunum.

Í Løgtinginum í dag fer hann at spyrja landsstýrismannin í samferðslumálum, um hann ikki heldur, at ein slíkur fundur hevði verið hóskandi.

– Hetta eru tvey stór verkløg og eg haldi, at í einum fólkaræðiligum samfelagið hevði tað verið hóskandi at almenningurin slapp at síggja ætlanirnar og slapp at gera sínar viðmerkingar og at seta spurningar, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tað, sum hann serliga heftir seg við, er staðið, har samfersluhavnin skal vera um um staðið, har ætlanin er at leggja Hovstunnilin.

– Samferðsluhavnin verður løgd beint við Lítluhólmar, so at tann innasti av teimum fer undir, samstundis sum tað ikki fer at verða siglandi ímillum teir longur.

Tað er ein umhvørvisligur spurningur um tað er rætt um um tað ikki hevði borið til at flutt havnina 50 metrar longur inn fyri at spart hendan blettin í náttúru okkara.

– Eftirkomarar okkara hava sama rætt sum vit at síggja tað vakra, sum er í natúruni og tí haldi eg, at ætlanin eigur at verða gjølliga umhugsað.

Hann sigur, at slikir almennir fundir eru fyriskipaðir fyrr við sera góðum úrsliti bæði tá ið ætlanin var at byggja nýtt Suðuroyarskip varð fyrireikað og tá ið arbeiðið at byggja Teistan varð fyrireikað.

Samstundis eru tað summi sum halda, at Hovstunnilin liggur nakað høgt.

Tað hevur verið ført fram, at fer nakar at tala at nú, fer tað bara at forkoma allari útbyggingini?

– Hetta er ikki ábyrgdarfull sjónarmið. Tað er skylda mín sum Løgtingsmaður at reisa spurningarnar, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Aftaná er ov seint.

– Og tað er púra vist, at ætlanirnar at gera berghol og samferðsluhavn fara ikki at verða seinkað av hesum, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Bíða eftir løgmanni

**Javnaðarflokkurin tekur onga støðu til málið um setanina av landsantikvari, fyrrenn løgmaður hevur tikið sína avgerð**

LANDSANTIKVARURIN
*Áki Bertholdsen*

– Vit eiga at lata tey, sum eru beinleiðis uppi í málinum taka gera sínar niðurstøður fyrst.

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins í andstøðu, heldur ikki at tað er rætt av honum at draga samanum málið um setanina av landsantikvari og at gera nakrar niðurstøður enn.

– Fyribils situr javnaðarflokkurin og bíðar eftir, hvat úrslit partarnir, sum eru beinleiðis uppi í málinum, koma til.

Løgmaður er fyrsti eftirlitsmyndugleiki hjá landsstýrisfólkunum og hann hevur avgjørdur boðað frá, at hann fer at kanna málið til botns. Og hann hevur boðað frá, at hann fer at taka eina skjóta avgerð.

– Og fyrrenn hann hevur tikið eina støðu, fer javnaðarflokkurin ikki at leggja seg út í málið. Hvat flokkurin fer at gera seinni, veldst hinvegin um, hvat úrslit Løgmaður og partarnir, sum annars eru beinleiðis uppi´i málinum, koma til, sigur Jòannes Eidesgaard.



*Javnaðarflokkurin bíðar eftir, hvat Løgmaður fer at gera í málinum um setanina av landsantikvari. Tá ið Løgmansins niðurstøða er greið, fer flokkurin at taka støðu*

# Løgtingsins Umboðsmaður eigur at kanna Annlis Bjarkhamar

**– Verður niðurstøðan hjá umboðsmanninum, at landsstýrismaðurin hevur borið seg skeivt at, eigur Annlis Bjarkhamar at leggja frá sær beinanvegin, heldur formaður sambandsfloksins**

LANDSANTIKVARUR
*Áki Bertholdsen*

– Hetta málið er so undarligt, at Annlis Bjarkhamar skyldar okkum øllum eina forkláring. Ikki minst skyldar hon Sínum Arge eina forkláring.

Lisbeth Petersen, formaður sambandsfloksins, sigur, at hon skilir onki av tí, sum er farið fram í sambandi við setanina av landsantikvari.

Annars heldur hon, at tað er sera torført at gera nakrar tryggar niðurstøður í málinum, sum tað liggur í løtuni, tí tingfólk og almenningur fáa ikki fult innlit í málið og tí koma allir upplýsingarnir ikki fram.

– Men eftir tí, sum hevur verið at sæð og hoyrt, er framferðin hjá Annlis Bjarkhamar so atfinningarsom, at tað er ein spurningur um tjóðveldisflokkurin ikki hevði staðið seg best í longdini við at funnið annað flokk at røkt starvið sum landsstýrismaður í mentamálum.



*–Málið um setanina av landsantikvari eigur at verða kannað til botns, tað skyldar Annlis Bjarkhamar okkum øllum, ikki minst Símun Arge, sum hon vrakaði. Tí eigur málið at verða lagt fyri Løgtingsins Umboðsmann, sigur Lisbeth Petersen, formaður sambandsfloksins*

Hon heldur, at tað er mangt, sum ljóðar merkiligt í hesum máli. Hon skilir slett ikki, at teksturin í teirri donsku lýsingini eftir landsantikvari, ikki var tann sami sum teksturin í teirri føroysku lýsingini.

Men hon heldur, at tað er sáddur so stórur ivi um hesa starvssetanina, at hetta ber ikki til at liva við.

– Og nú er eisini ivi sáddur um antin setanarnevndin hevur gjørt sítt arbeiðið á fullgóðan hátt og tað kunnu vit heldur ikki liva við, leggur hon afturat.

– Í øllum førum er tað greitt, at føroyski umsøkjarin var skikkaður til starvið og tí er tað óskiljandi, at ein annar varð settur.

### Sjálvsagt fyri umboðsmannin

Men formaður sambandsfloksins sigur, at málið er so ógreitt, at tað eigur at vera kannað til botns.

Og hon heldur, at hetta er eitt sjálvsagt mál at leggja fyri løgtingsins umboðsmann.

– Umboðsmaðurin kann fáa allar upplýsdingar fram og koma til eina endaliga niðurstøðu í málinum sum byggir á fult innlit í málið.

Og hon staðfestir eisini, at kemur umboðsmaðurin til eina niðurstøðu, sum gongur Annlis Bjarkhamar ímóti, eigur hon at leggja frá sær beinanvegin.

Hon minnist eisini hvat fór fram, tá ið Jørgen Niclasen mátti leggja frá sær fyri kortum.

– Hann mátti frá, tí hann hevði ikki borið seg at sum hann átti, hóast onki revsivert var var farið fram. Bara tað, at ivi varð sáddur um embætisførslu hansara, var nóg mikið til at hann varð feldur, eisini av tjóðveldisflokkinum.

Men um Annlis Bjarkhamar heldur ikki hevur borið seg at, sum hon átti, vita vit ikki, fyrrenn ein nágreinilig kanning er gjørd og tí eigur málið at verða lagt fyri umboðsmannin.

– Ikki fyrrenn hann er komin til eitt úrslit, ber til hjá okkum øðrum at taka eina haldgóða niðurstøðu.

– Men merkiligt, tað er málið og Annlis Bjarkhamar skyldar okkum øllum, ikki minst tí vrakaða umsøkjaranum, at at full greiða fæst a tí, leggur hon afturat.